Skemt



MYND: POLFOTO

# Seinasti mótin í Palestina

Tað var eftir øllum at døma gongd í søluni av mótaklæðum í Palestina nú fyri jól. Her gongur ein maður – sjálvur klæddur í seinasta móta – fram við einum klædnahandli í Nablus á vestara áarbakka.



MYND: POLFOTO

## Klárur til dystin

**Sumo glímarin Hakuho, sum er ættaður úr Mongolia, er klárur til nýggjársdyst í Tokio í Japan. Einki sæst til mótstøðumannin, men vit halda, at tað hevði verið spennandi at sæð ein ordiliga føroying í slíkum bardaga. Hvat við at Tobbi ella Kaj Leo royndu seg í slíkum dysti?**




MYND: POLFOTO

## Hvar er kavin?

Eysturríkski skíðarin Gregor Schlierenzauer hevur fingið flog á sítt lop í skíðkapping í Týsklandi. Spurningurin er bara, um flogið er ov høgt, tí her sæst einki til nakra kavabreyt, men lendingin kann ivaleyst verða líka góð fyri tað.

## Í RANGASTRÚPAN

Bussskýlið sorlaðist sundur, men ein genta, ið var í skýlinum, sum endaði á skaðastovuni seinni, kom til alla lukku sera væl frá hendingini.
*Vágaportalurin*

**Eisini mvg á tubbaki?**
Bileigarar skulu hava MVGið aftur
*Sosialurin*

**Og so alt stríðið fyri at fáa hann heim**
Skálaberg farin av landinum
*Portalurin*

**So keða teir seg ikki ta løtuna**
Jóladagarnar ringja ofta fleiri fólk til politiið bara fyri at hava onkran at práta við.
*Sosialurin*

**Lat okkum so heldur fáa veðurlagsbroytingar**
Kuldin trýstir oljuprísin upp
*Dimma*

**Positivt problem**
Brenna inni við heiligvági
*Sosialurin*

**Góður spurningur**
Fer veruleikin at rína við løgmann?
*Viðmerking í Dimmu*

**Hvar munnu tær halda til?**
TB-kvinnurnar halda jól á øðrum plássi
*Kringvarp.fo*

**Antin flogfar ella bilur á skeivari leið**
Bilur bar við flogfar hjá Atlantic
*Dimma*

## UMAFTURAFTURUM
### HØGNI DJURHUUS



# Telgdir gudar

Tað var ein surrealistisk ævinleikakend religiøs løta at síggja bilferðina hjá Obama keisara út í Kastrup í upphitaðum útlátskavaroki tá stutt fyri jól.

Stóra veðurlagsemjan við Føroyum í klombrum í einum donskum ES-lista gjørdist høvuðleyst jólatrøll. Eins og friðurin í kríggjunum hjá USA.

Men nú var Gud so á veg heim aftur í hitan. Fyri aðru ferð í ár úr Danmark, úr okkara ríki, okkara ríki.

Sekund fyri sekund lýstu garvaðir journalistar, sum kalla seg seriøsar, ferðina hjá beistinum (soleiðis eitur bilurin) á grovsaltaða vegnum, har sum tú og eg annars ofta eisini hava koyrt.

Sum ein dópur ella hálvrundur føðingardagur hjá drotningini og teimum. Sekund fyri sekund í fólksins tænastu.

Hví spælir fjórða statsvaldið í einum tí fremsta fólkaræðinum við í slíkum tvætli? Hví boyggir journalistikkurin seg altíð fyri undirhaldinum og fer at gera undirhald í staðin fyri upplýsing og avdúking? Eg veit ikki svarið. Annað svar enn tað svarið, at hetta vilja hyggjarar, lurtarar, lesarar hava.

Gud á veg heim aftur í sítt stóra ríki í kavaroki og líkindum til hálku. Sekund fyri sekund fyri sekund til hann hvarv á stórum skínandi veingjum úr hvítagulli upp í himmalin, sum er hjástatur í hansara ríki.

Gudsspottan at samanbera amerikanska forsetan og Gud? Samanberingin er eyðsýnd. Fjølmiðlarnir í Danmark høvdu ikki gjørt meira burturúr, um tað var Messisas, sum kom til Keypmannahavnar, ja, mín sann tvær ferðir sama árið.

Ert tú tann, ið koma skal, ella skulu vit vænta Obama? Fyri Guds skuld ikki Osama.

Amerikanski forsetin og Gud kunnu gera av við okkum øll í einum høggi. Gud ger tað neyvan aftur.

»Tey telgja sær gudar« kallaði Jens Pauli Heinesen eina skaldsøgu.

Til veruleikan: heimurin er hvørki betri ella verri, tá Obama hevur verið forseti í fýra ár. Heldur ikki, tá hann hevur verið forseti í átta ár. Sjálvandi verður hann afturvaldur. Hann sær jú so gott út.

Um átta ár er framvegis kríggj í Afganistan, um átta ár er framvegis kríggj í Irak. Um átta ár hevur USA gjørt innrás í og hertikið okkurt landið afturat. Um átta ár eru framvegis fangar á Kuba, sum ongantíð hava hitt ein løgfrøðiligan dómara og ongantíð eru spurdir, um teir eru sekir ella ei.

Eisini í Føroyum grótu fólk, tá konufólkarevurin John F. Kennedy varð skotin. Tey telgja sær gudar. Nú gerast eyguni blonk, tá Obama er í sjónvarpinum. Tey telgja sær gudar.

Í summar eiga okkara egnu fjølmiðlar tørn. Margreta kunngjørdi nýggjársaftan, at hon og maðurin fara til Føroya í summar. Tá sleppa føroyskir journalistar til arbeiðis, at renna aftaná. Hvar er hon nú? Hvat ger hon nú? Hvønn hitti hon har? Er lagt upp úr døgurðapottinum? Fornermar hon aftur Høgna Hoydal hesaferð? Eru ommubørnini við? Eru verdøturnar við? Hvør fær kross? Hvønn kjóla fer kona løgmans í? Eingin lesur SE&HØR, men øll vita, hvat stendur í tí.

Tollarar taka ikki móti endanum, tá stuttleikabáturin Dannebrog leggur at. Eingin sleppur inn um Schengengirðingarnar at flagga við pappírsmerkjum. Hashhundarnir vera har ikki. Einki trygdareftirlit. Drotningarmaðurin hevur ikki longur spreingievni í undirbuksunum.

Síggi nú í Amtstíðindum, at hjúnini flúgva.

Rúkandi asfalt og angandi træverja og sóljugentur og føroysk klæði og bygdamenning og lívverjar og undirbrotligheit. Og eingin spyr hví. Eingin spyr, hvat fanin rakar tað okkum.

Ikki bara fjøldin er býtt. Øll eru býtt. Tí er brúk fyri gudum, telgdum gudum at hella seg innat.